

## Tikin fyri eld í vøggustovu

Í Meksiko hevur ákæruvaldið skuldsett níggju almenn starvsfólk fyri óviljað manndráp í sambandi við ein eldsbruna í einari vøggustovu, sum kostaði 47 børnum lívið. Samstundis hevur løgreglan fingið boð um at handtaka níggju onnur fólk, sum hvurvu aftan á eldsbrunan. Kanningar benda á, at neistar frá einari hitaskipan festu í vøggustovuna, og tað er eisini staðfest, at vøggustovan hevði onga eldávaringarskipan og heldur onga sløkkiútgerð. Tað var tann 5. juni, at eldur kom í vøggustovuna. 30 børn doyðú beinanvegin, og 17 doyðu seinni. Meksikanskir fjølmiðlar skriva, at 142 børn vóru í vøggustovuni, sum var knappar 150 fermetrar.

# Grønland sjálvberandi búskap um góð 10 ár

**Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, heldur ikki, at grønlendingum nýtist at bíða so leingi eftir fullveldinum**

GRØNLAND SJÁLVSTÝRI

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

- Eftir mínum tykki er tað ikki óhugsandi, at Grønland verður ført fyri at standa á egnum beinum fíggjarliga innan fyri tey næstu 10 til 15 árini, og so er fyritreytin fyri fullveldi til staðar.

Tað sigur Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, við kringvarpið KNR. Hann sigur seg kortini vóna, at Grønland og Danmark kunnu reka ein felags uttanríkis- og trygdarpolitikk sum tveir javnbjóðis partar. Herumframt kundu partarnir fingið ágóða av einum øðrvísi samstarvi innan útbúgvingarøkið, heldur hann.

Lars Emil Johansen leggur dent á, at tað ber til at koma langt við samráðingum. Samráðingarnar, sum hava verið handan læstar dyr um grønlendskt sjálvstýri, hava verið harðar og bersøgnar, men kortini í einum jaligum anda.

- Tey tøttu bondini millum Grønland og Danmark eru ikki bara søgulig og mentanarlig, men fyrst og fremst biologisk. Dønum dámar eisini væl at vitja tær endaleysu víddirnar og ta stórslignu náttúruna í Grønlandi. Hinvegin kenna grønlendingar seg væl í tí væl skipaða Danmartk, og veðurlagið ger sítt. Hesi tøttu bond kunnu ongar politiskar fyriskipanir oyðileggja, sigur Lars Emil Johansen við KNR.



*Lars Emil Johansen, fólkatingsmaður, er bjartskygdur um framtíð Grønlands*
*Mynd: KNR*

## Sjálvstýrið kemur ikki av sær sjálvum

**- Dreymurin bleiv til veruleika, segði landstingformaðurin Josef Motzfeldt, tá hann hevði fingið sjálvstýrislógina frá Margrethu drotning**

GRØNLAND SJÁLVSTÝRI

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*




*Josef Motzfeldt er formaður í Landstinginum*
*Mynd: KNR*

Tað var landstingsformaðurin, Josef Motzfeldt, sum tók ímóti sjálvstýrislógini, sum drotningin handaði honum í tingsalinum fyrrapartin sunnudagin. Við hátíðarborðhaldið seinni um dagin ásannaði tingformaðurin, at dagurin var serstakur.

- Tað verður torført at samanbera hendan dagin við nakran av hinum døgunum, sum eg havi livað. Hetta er fyrst og fremst ein dagur, har vit øll kunnu kenna okkum sum javnbjóðis fólk. Vit eru vorðin samstarvsfelagar hjá Danmark og øðrum londum, sum vit plaga at samráðast við. Stutt sagt hava vit tikið eitt munagott stig ímóti at víðka sjálvstýrið, segði Josef Motzfeldt í røðu síni.

-Dreymar kunnu gerast veruleiki, men sjálvstýrið er ikki ein ókeypis gáva. Framtíðin fer at krevja meiri av okkum og øllum fólkinum, tí sjálvstýrið kemur ikki av sær sjálvum, men at krevja meiri arbeiði og størri ábyrgd, segði tingformaðurin.

# Hevur hvørki ásett dag ella ár fyri fullveldið

**-Grønland er á veg ímóti fullveldi, men eg vil hvørki seta dag ella ár á enn, sigur Kuupik Kleist, landsstýrisformaður**

GRØNLAND SJÁLVSTÝRI

*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Lars Løkke Rasmussen, Kuupik Kleist og Heindrikur prinsur til hátíðarhaldið sunnudagin*
*Mynd: KNR*

- Eg eri fullkomiliga sannførdur um, at Grønland er á veg ímóti fullveldi, men eg vil ikki seta dag ella ár á enn.

Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, er ikki í iva um, at grønlendingar fara at víðka tað sjálvstýri, sum teir nú hava fingið, og at málið er fullveldi, sum skal byggja á ein sjálvberandi búskap. Men á tíðindafundi í Nuuk fyrradagin vildi hann ikki koma við einum boði uppá, nær fullveldið kemur.

-Tað tekur ta tíð, sum tað tekur einum fólki at gróðuseta og menna kravið um at fáa sítt egna sjálvstøðuga ríki. Eftir mínum tykki er hetta ikki nakað, sum kann áleggjast úr erva. Tað eru fleiri fyritreytir, sum skulu lúkast, áðrenn fullveldi kann gerast veruleiki, og tann týdningarmesta er, at fólkið sjálvt kemur til ta kenslu og niðurstøðu, at nú er tíðin búgvin til fullkomið frælsi. Okkara uppgáva er nú at fáa sjálvstýrið at virka, og síðani kunnu vit hittast aftur at gera av, hvat næsta stigið skal verða, segði tann nývaldi landsstýrisformaðurin.

### Nærri USA

Kuupik Kleist segði, at tað nýggja landsstýrið fer at taka stig til at bøta um viðurskiftini millum Grønland og USA. Hann segði at hóast viðurskiftini millum londini bæði hava ofta verið køld orsakað av herstøðini í Thule, hevur tað altíð borið til at finna semju. Hann upplýsti, at landsstýrið fer at seta seg í samband við amerikonskumyndugleikarnar um nakrar mánaðir við tí fyri euga at økja samstarvið innan eitt nú handil og mentan.

- Okkum tørvar at lata upp hurðar og at knýta samband við so nógvar tjóðir, sum til ber. Grønland er luttakari í altjóða samfelagnum, segði Kuupik Kleist.